Almanna- og bústaðamálaráðið

Dagfesting:	05.05.2026
Mál nr.:	26/00962
Málsviðgjørt:	JAK, HP
Ummælistíð:	15.01.2026-09.02.2026
Eftirkannað:	20.04.2026

Uppskot til

Løgtingslóg
um
leigustuðul

Treytirnar fyri leigustuðli

§ 1. Húski, sum býr til leigu sambært leigulógini í sjálvstøðugari íbúð við egnum køki, og sum ikki eigur aðra fastogn, ið kann nýtast sum bústaður, hevur rætt til leigustuðul sambært hesi løgtingslóg, sbr. tó § 2.

Serlig undantøk

§ 2. Persónur, sum býr í einum leigubústaði, ið er fevndur av kapitli 6 í almannalógini, hevur ikki rætt til leigustuðul.
Stk. 2. Húski, ið leigar ein bústað frá einum ella báðum foreldrum ella verja hjá einum av persónunum í húskinum, hevur heldur ikki rætt leigustuðul.

Leigustuðulsupphæddin

§ 3. Leigustuðulin er 20% av húsaleiguni sum ásett í leigusáttmálanum, men í mesta lagi 1.500 kr. um mánaðin, sbr. tó §§ 4 og 5.

§ 4. Fyri húski við einum persóni yvir 18 ár lækkar leigustuðulin við 5% av inntøkugrundarlagnum, sum er omanfyri 350 túsund kr.
Stk. 2. Fyri húski við tveimum ella fleiri persónum yvir 18 ár lækkar leigustuðulin við 5% av inntøkugrundarlagnum, sum er omanfyri 500 túsund kr.
Stk. 3. Verður leigustuðulin sambært stk. 1 ella 2 lægri enn 300 kr., fellur stuðulin burtur.

§ 5. Inntøkugrundarlagið hjá húskinum verður roknað sambært § 7 í løgtingslóg um familjuískoyti.
Stk. 2. Persónur yngri enn 23 ár, ið sambært Landsfólkayvirlitinum er skrásettur at búgva saman við einum ella báðum foreldrum sínum ella saman við sínum verja, telur hvørki við í talið á persónum yvir 18 ár í húskinum ella í inntøkugrundarlagið hjá húskinum sambært § 4.

§ 6. Upphæddin í § 3 og inntøkumørkini í §§ 4 og 5 verða javnað sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar.

Umsókn og útgjald

§ 7. Umsókn um leigustuðul skal latast Almannaverkinum á serligum oyðublaði saman við avriti av undirskrivaðum leigusáttmála.
Stk. 2. Almannaverkið kann krevja nærri upplýsingar og skjalprógv fyri, at treytirnar fyri stuðlinum eru loknar.
Stk. 3. Almannaverkið kann útvega sær upplýsingar av týdningi fyri viðgerð av málum um leigustuðul frá TAKS, Landsfólkayvirlitinum, kommunalum myndugleikum og øðrum viðkomandi myndugleikum.

§ 8. Leigustuðul verður veittur frá mánaðinum eftir, at Almannaverkið hevur móttikið umsóknina, og verður rindaður mánaðarliga afturúr á kontu hjá einum persóni í húskinum.

Skjalprógv fyri útreiðslur

§ 9. Fyri hvørjar 12 mánaðir, eitt húski hevur móttikið leigustuðul, skal húskið mótvegis Almannaverkinum skjalprógva veruligu útreiðslurnar til húsaleigu seinasta árið. Um slíkt skjalprógv ikki verður latið Almannaverkinum innan ásetta freist, kann Almannaverkið steðga útgjaldinum av leigustuðli, inntil nøktandi skjalprógv er móttikið.

Fráboðanarskylda

§ 10. Húski, sum móttekur leigustuðul, hevur skyldu til skjótast gjørligt at boða Almannaverkinum frá broytingum í viðurskiftum, sum kunnu ávirka rættin hjá húskinum til stuðulin.

Stuðul móttikin av órøttum

§ 11. Hevur ein persónur móttikið leigustuðul av órøttum, og átti hann at verið vitandi um hetta, skal upphæddin rindast Almannaverkinum aftur. Tað sama er galdandi, um orsøkin er vantandi ella skeivar upplýsingar frá persóninum, sum viðkomandi hevur havt skyldu at lata Almannaverkinum.
Stk. 2. Almannaverkið kann gera avtalu við skuldaran um afturgjaldsskipan. Í sambandi við avtalur um afturgjaldsskipan kann Almannaverkið útvega sær upplýsingar um ognarviðurskifti hjá skuldara frá TAKS og øðrum viðkomandi myndugleikum.
Stk. 3. Afturgjaldskrav sambært stk. 1 kann krevjast inn við panting ella afturhaldast í A-inntøkuni.
Stk. 4. TAKS fremur sambært stk. 3 panting eftir reglunum um innkrevjing av skattum og avgjøldum og afturheldur í A-inntøku sambært reglunum um lønarafturhald í skattalógini.

Kæra

§ 12. Avgerðir hjá Almannaverkinum sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærari hevur fingið fráboðan um avgerðina.

Revsing

§ 13. Er ikki harðari revsing ásett eftir revsilógini, verður persónur, sum annaðhvørt tilætlað ella av grovum ósketni letur Almannaverkinum skeivar upplýsingar sambært § 7, stk. 1 ella 2 ella § 9, 1. pkt. í løgtingslógini, ella sum ikki heldur fráboðanarskylduna sambært § 10, revsaður við sekt.

Gildiskoma

§ 14. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. september 2026.

Broyting í almannalógini

§ 15. Í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur (Almannalógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 12. desember 2020, § 11 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, løgtingslóg nr. 71 frá 5. mai 2022, § 6 í løgtingslóg nr. 32 frá 9. mars 2023, løgtingslóg nr. 154 frá 19. desember 2023, løgtingslóg nr. 45 frá 27. mars 2025 og løgtingslóg nr. 180 frá 20. november 2025, verður í § 21, stk. 4, aftan á "familjuískoyti" sett: ", leigustuðul sambært løgtingslóg um leigustuðul".

Broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk

§ 16. Í løgtingslóg nr. 63 frá 15. mai 2012 um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum seinast broytt við § 8 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verður í § 12, stk. 6 aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Leigustuðul sambært løgtingslóg um leigustuðul verður ikki mótroknaður í stuðulsveitingini."

Broyting í løgtingslóg um familjuískoyti

§ 17. Í løgtingslóg nr. 160 frá 24. desember 2015 um familjuískoyti, sum broytt við løgtingslóg nr. 167 frá 20. desember 2017, løgtingslóg nr. 187 frá 21. desember 2018, løgtingslóg nr. 65 frá 9. mai 2019, løgtingslóg nr. 18 frá 10. mars 2020, § 10 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, løgtingslóg nr. 136 frá 25. oktober 2022, løgtingslóg nr. 42 frá 29. mars 2023 og løgtingslóg nr. 162 frá 20. desember 2023, verður í § 7, stk. 3, 2. pkt. aftan á "avlamisveiting" sett: ", leigustuðul sambært løgtingslóg um leigustuðul".

Broyting í skattalógini

§ 18. Í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin), sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 109 frá 19. september 2023, sum broytt við løgtingslóg nr. 163 frá 20. desember 2023, løgtingslóg nr. 39 frá 16. mai 2024, løgtingslóg nr. 145 frá 20. desember 2024 og løgtingslóg nr. 75 frá 30. apríl 2025, verður í § 29, nr. 13 sum litra g sett:
"g) Leigustuðul sambært løgtingslóg um leigustuðul."

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Prísirnir á føroyska bústaðamarknaðinum eru nógv hækkaðir seinnu árini, og ein munandi størri partur av inntøkuni hjá føroyskum húskjum fer í dag til bústaðin.

Meðan persónar, sum keypa ein bústað, hava rætt til rentustuðul, verður eingin stuðul veittur teimum, sum búgva til leigu.

Tað liggur ein andsøgn í hesum, tí tað eru fyrst og fremst persónar við høgum inntøkum, sum fáa játtað lán til at keypa ein bústað í Føroyum, meðan tey við lágum inntøkum og miðalinntøkum í størri mun eru avmarkað til leigubústaðamarknaðin. Vit hava sostatt eina støðu í dag, har tey við størru inntøkunum fáa ein almennan stuðul til bústaðarútreiðslur, samstundis sum tey við lægru inntøkunum ongan stuðul fáa.

Landsstýriskvinnan ynskir at broyta hetta, og við lógaruppskotinum verða tí tikin stig til at veita ein inntøkugrundaðan leigustuðul til húski, sum búgva til leigu í Føroyum. Høvuðsendamálið við lógaruppskotinum er at bøta um fíggjarligu støðuna hjá føroyskum húskjum við lág- og miðalinntøkum.

1.2. Galdandi lóggáva

Tað er í dag eingin yvirskipað lóggáva um leigustuðul í Føroyum. § 15 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur ásetur tó, at ein persónur, ið fær fyribils uppihaldsveiting, í serligum førum kann fáa stuðul til bústaðarútreiðslur. Nærri reglur um hetta eru ásettar í kunngerð nr. 13 frá 12. februar 2013 um ískoyti til høgar bústaðarútreiðslur.

Tað eru bert einstakir persónar, sum fáa stuðul sambært hesi áseting í almannalógini, og hesir persónar fáa vanliga bert stuðul í eitt avmarkað tíðarskeið.

Harafturat kunnu pensjónistar, sum lúka treytirnar í kunngerð nr. 19 frá 14. mai 2004 um persónliga viðbót, fáa stuðul vegna serliga trupul kor. Persónliga viðbótin tekur støði í eini tørvsmeting, sum m.a. tekur hædd fyri bústaðarútreiðslunum hjá pensjónistinum.

Tað eru í dag nakrir fáir pensjónistar, sum umvegis kunngerðina um persónliga viðbót fáa stuðul til bústaðarútreiðslur.

Fyri báðar stuðulsskipanirnar omanfyri er tað ein treyt fyri at fáa stuðul játtaðan, at viðkomandi ikki hevur aðra inntøku og harafturat ikki hevur ognir av týdningi.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við leigustuðlinum

Leigustuðulin er eitt sosialpolitisk amboð, ið hevur sum høvuðsendamál at bøta um fíggjarligu støðuna hjá lág- og miðalløntum føroyingum, sum búgva til leigu.

Endamálið við lógaruppskotinum er harafturat at skapa javnari treytir á bústaðamarknaðinum við at minka munin millum at eiga ein bústað og leiga ein bústað.

Ein partur av teimum, sum búgva í leigubústaði, eru einstaklingar og familjur við lágum inntøkum, har fíggjarligu umstøðurnar ikki geva møguleika at fáa lán til at keypa ein bústað. Nógvar av hesum familjum rinda samstundis eina so stóra húsaleigu, at tað ikki er møguligt at spara saman til at keypa ein bústað í framtíðini. Við lógaruppskotinum fáa hesar familjurnar størri fíggjarligt rásarúm og ein lættari gerandisdag.

Støðan á bústaðarmarknaðinum er eisini ein forðing fyri, at føroyingar, sum eitt nú eru fluttir uttanlands í lestrarørindum, kunnu flyta heim aftur til Føroya. Tí tað er dýrt at búgva í Føroyum. Tað er dýrt at keypa ein bústað, og tað er dýrt at búgva í leigubústaði. Lógaruppskotið ger tað lættari hjá útisetum at flyta heim aftur, tí tað verður fíggjarliga lættari at flyta heim í ein leigubústað.

Støddin á leigustuðlinum

Við uppskotinum fáa fólk, sum búgva í leigubústaði við egnum køki, ein lógartryggjaðan rætt til leigustuðul.

Leigustuðulin verður ásettur sum ein prosentpartur av húsaleiguni, tó við einum hámarki upp á 1.500 kr. um mánaðin. Tað merkir, at ein leigustuðul upp á 20 prosent verður veittur til eina húsaleigu upp til 7.500 kr. um mánaðin.

Upphæddin, ið verður veitt, er treytað av talinum á persónum yvir 18 ár í húskinum og av húskisinntøkuni. Húski við lágum inntøkum fáa meira í leigustuðli enn húski við hægri inntøkum, tí leigustuðulin lækkar stigvíst, tá inntøkan fer upp um eitt inntøkumark.

Ein stakur persónur, ið hevur inntøkugrundarlag upp til 350 tús. kr., fær fullan leigustuðul, svarandi til 20 % av húsaleiguni, tó í mesta lagi 1.500 kr. um mánaðin.

Tá inntøkugrundarlagið er hægri enn 350 tús. kr., lækkar leigustuðulin við 5 % av tí partinum av inntøkuni, sum er omanfyri 350 tús. kr.


Henda skipan, ið kann samanlíknast við mótrokning av pensjón, verður eisini brúkt í sambandi við útrokning av familjuískoyti.

Húski við tveimum ella fleiri persónum yvir 18 ár, sum hava inntøkugrundarlag lægri enn 500 tús. kr., fáa fullan leigustuðul. Á sama hátt sum hjá støkum lækkar leigustuðulin við 5 % av tí partinum av inntøkuni, sum er omanfyri 500 tús. kr.


Er leigustuðulin roknaður at vera lægri enn 300 kr. um mánaðin, fellur rætturin til stuðulin burtur. Hjá einum støkum persóni fellur leigustuðulin burtur, tá inntøkugrundarlagið fer upp um 638 tús. kr. Hjá húskjum við tveimum ella fleiri persónum yvir 18 ár fellur leigustuðulin burtur, tá samlaða inntøkugrundarlagið hjá húskinum fer upp um 788 tús. kr.

Myndirnar niðanfyri vísa, hvussu leigustuðulin lækkar, tá inntøkan hækkar hjá ávikavist støkum og hjá húskjum við tveimum ella fleiri persónum yvir 18 ár.

Leigustuðul til húski við einum persóni yvir 18 ár



Leigustuðul til húski við tveimum ella fleiri persónum yvir 18 ár



Dømini niðanfyri vísa, hvussu leigustuðulin ávirkar tøka inntøku hjá ymsum samfelagsbólkum. Dømini vísa upphæddir um mánaðin, roknaðar við støði í miðal kommunuskattaprosenti og miðal kommunalum barnafrádrátti. Húsaleigurnar í dømunum eru tilvildarliga ásettar.

Dømi 1: Stakur persónur uttan børn við hægstu fyritíðarpensjón – húsaleiga 5.500

Fyritíðarpensjón	16.732
Skattur og gjøld	567
Inntøka áðrenn bústaðarútreiðslur	*16.165*
Húsaleiga	5.500
Leigustuðul	1.100

Inntøka íroknað bústaðarútreiðslur	***11.765***

Dømi 2: Stakur løntakari uttan børn við arbeiðsinntøku upp á 400 tús. kr. um árið

Arbeiðsinntøka	33.333
Skattur og gjøld	12.692
Inntøka áðrenn bústaðarútreiðslur	*20.642*
Húsaleiga	7.500
Leigustuðul	1.292
Inntøka íroknað bústaðarútreiðslur	***14.434***

Dømi 3: Stakur løntakari við tveimum børnum (5 og 8 ár) við arbeiðsinntøku upp á 250 tús. kr. um árið

Arbeiðsinntøka	20.833
Familjuískoyti, barnaískoyti og barnagjald	6.249
Skattur og gjøld	4.350
Inntøka áðrenn bústaðarútreiðslur	*22.732*
Húsaleiga	8.500
Leigustuðul	1.500
Inntøka íroknað bústaðarútreiðslur	***15.732***

Dømi 4: Hjún við 2 børnum (5 og 8 ár), sum arbeiða fulla tíð sbrt. fastlønarsáttmála hjá Føroya arbeiðarafelag (336,5 tús. kr. um árið í part)

Arbeiðsinntøka bæði tils.	56.086
Skattur og gjøld bæði tils.	17.585
Inntøka áðrenn bústaðarútreiðslur	***38.501***
Húsaleiga	10.000
Leigustuðul	773
Inntøka íroknað bústaðarútreiðslur	***29.274***

Dømi 5: Hjún fólkapensjónistar uttan aðra inntøku enn fólkapensjón og AMEG


Fólkapensjón bæði tils.	28.938
Skattur og gjøld bæði tils.	4.375
Inntøka áðrenn bústaðarútreiðslur	***24.563***
Húsaleiga	7.000
Leigustuðul	1.400
Inntøka íroknað bústaðarútreiðslur	***18.963***

Ein vansi, sum ikki slepst undan í sambandi við veitingar, ið verða veittar eftir inntøku, er, at effektivi markskatturin verður øktur. Fyri at avmarka ávirkanina á arbeiðsvirknið er mótrokningarprosentið ásett so lágt sum gjørligt. Ein løntakari við ársinntøku t.d. upp á 400 tús. kr. hevur ein markskatt á umleið 46 %. Um hesin persónurin eisini fær leigustuðul, missir hann 5 krónur av leigustuðlinum fyri hvørjar 100 krónur lønin hækkar, svarandi til eina hækking av effektiva markskattinum upp á 5 prosentstig. Um ein stakur persónur við inntøku millum 450 tús. og 600 tús. kr. fær leigustuðul, hevur tað við sær eina hækking av effektiva markskattinum úr uml. 51 % upp til umleið 56 %.

Fólkapensjónistar og fyritíðarpensjónistar, ið hava inntøku aftrat pensjónini, hava eisini hægri effektivan markskatt. Mótroknað verður í fólkapensjónini við 20 % av inntøku omanfyri enn 61.900 kr., og mótroknað verður í fyritíðarpensjón við 30 % av inntøku omanfyri 106.000 kr.

Hetta kemur sostatt aftrat vanliga markskattinum. Mótrokning av leigustuðli kemur eisini aftrat sum effektivur markskattur. Leggjast skal aftrat, at fólkapensjónistar og fyritíðarpensjónistar, har leigustuðulin ávirkar effektiva markskattin, hava lutfalsliga høga inntøku.

Effektivur markskattur hjá løntakara uttan børn



Aðrar skipanir, ið økja um effektiva markskattin, eru familjuískoyti og fíggjarligt fríplás á dagstovnum. Mótrokning av familjuískoyti til stakar uppihaldarar steðgar við 290.000 kr., meðan mótrokning av leigustuðli byrjar við 350.000 kr. Sostatt umskarast mótrokningin av hesum báðum skipanunum ikki. Tað kann koma fyri, at ein persónur fær hækkaðan effektivan markskatt av bæði leigustuðli og fíggjarligum fríplássi á dagstovnum samstundis. Tá kann effektivi markskatturin verða munandi hægri enn víst í myndini omanfyri. Stakur uppihaldari við inntøku millum 350.000 og 415.000 verður mótroknaður í leigustuðli, samstundis sum viðkomandi fær lutvíst fíggjarligt fríplás.

Tað eru nógv ymisk sløg av familjum, og nógvir ymiskir hættir hjá húskjum at innrætta seg, sum ikki neyðturviliga byggja á siðbundin familjumynstur. Eru tað fleiri persónar yvir 18 ár í einum húski, verður spurningurin, hvør inntøka skal telja við í inntøkugrundarlagnum. Lógaruppskotið ásetur í hesum sambandi, at allir persónar yvir 18 ár telja við í inntøkugrundarlagið, tá leigustuðulin skal roknast. Vaksin børn hjá persóni ella persónum í húskinum telja tó ikki við í inntøkugrundarlagið.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við lógaruppskotinum verður veittur ein leigustuðul svarandi til 20 prosent av húsaleiguni, tó í mesta lagi 1.500 kr. um mánaðin.

Húski við einum persóni yvir 18 ár, sum hevur inntøkugrundarlag upp til 350 tús. kr., kunnu fáa fullan leigustuðul. Leigustuðulin lækkar við 5 % av inntøkuni, sum er omanfyri 350 tús. kr.

Húski við tveimum ella fleiri persónum yvir 18 ár, ið hava inntøkugrundarlag upp til 500 tús. kr., fáa fullan leigustuðul. Leigustuðulin lækkar við 5 % av inntøkuni, sum er omanfyri 500 tús. kr.

Ein av treytunum fyri leigustuðlinum verður, at persónurin ella húskið ikki eigur nakra fastogn, ið kann nýtast sum bústaður.

Politiska ynskið er, at leigustuðulin ikki skal ávirka rættin til aðrar almannaveitingar. §§ 15-17 í lógaruppskotinum gera tí fylgilógarbroytingar í ávikavist almannalógini, løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk og løgtingslóg um familjuískoyti, so leigustuðulin ikki verður drigin frá fyribils uppihaldsveitingini, stuðulsveitingini sambært § 12 í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, ella familjuískoytinum.

Tað er somuleiðis eitt politiskt ynski, at leigustuðulin skal vera ein skattafrí veiting. Uppskotið til § 18 ger tí fylgilógarbroyting í skattalógini, so leigustuðulin verður undantikin skattskylduni.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið hevur verið alment til ummælis á ummælisportalinum hjá Føroya landsstýri í tíðarskeiðinum 15. januar 2026 til 9. februar 2026 kl. 12.00.

Lógaruppskotið varð harafturat sent beinleiðis til hesar partar:

- Almannaverkið
- MEGD
- Brekumboðið
- MARK
- Vinnuhúsið
- Bústaðir
- Fakfelagssamstarvið
- Samtak
- Samverk
- Sosialráðgevarafelag Føroya
- Kommunufelagið
- Fíggjarmálaráðið
- Tilfeingis- og vinnumálaráðið
- Landsbankan
- LÍV
- Betri Pensjón
- Áhugafelagið Lutaíbúðir
- Landsfelagið Pensjonista

Almanna- og heilsumálaráðið (nú: Almanna- og bústaðamálaráðið) fekk viðmerkingar frá hesum pørtum:

- Føroya Kærustovni
- Landsfelag Pensjónista
- Landsbanka Føroya
- MARK

- Vinnuhúsinum (Føroya Arbeiðsgevarafelag)
- Bústøðum
- Almannaverkinum
- Heilsuhjálparafelag Føroya
- Áhugafelagnum Lutaíbúðir
- Verkafólki
- Boga Holm Mikkelsen (privatpersónur)

Ummælini verða viðgjørd niðanfyri:

Føroya Kærustovnur vísir í ummælinum á, at sambært § 12 í lógaruppskotinum fara avgerðir hjá Almannaverkinum um leigustuðul at kunna kærast til kærustovnin. Føroya Kærustovnur vísir á, at lógaruppskotið sostatt víðkar heimildarøkið og økir um arbeiðsbyrðuna hjá kærustovninum. Føroya Kærustovnur metir varliga, at talan verður um eini 20 kærumál árliga, og út frá hesum verður mett, at árligi kostnaðurin fyri viðgerð av kærum verður 200 tús. kr. Føroya Kærustovnur heitir tískil á Almanna- og heilsumálaráðið (nú: Almanna- og bústaðamálaráðið) um at taka hædd fyri øktu arbeiðsbyrðuni á kærustovnin, og avleidda kostnaðinum av hesum, tá fíggjarligu avleiðingarnar av lógaruppskotinum skulu gerast upp.

Almanna- og bústaðamálaráðið hevur tikið viðmerkingina hjá Føroya Kærustovni til eftirtektar og hevur rættað tann partin av almennu viðmerkingunum, sum snúgva seg um fíggjarligu avleiðingarnar av lógaruppskotinum.

Landsfelag Pensjónista heldur tað vera skilagott, at húski, sum búgva til leigu í sjálvstøðugari íbúð, fáa rætt til leigustuðul við lógaruppskotinum. Landsfelag Pensjónista ger tó greitt, at stuðulshámarkið upp á 1.500 kr. um mánaðin er ov lágt og eigur at verða hækkað til 3.000 kr. um mánaðin. Sum grundgeving vísir Landsfelag Pensjónista á, at nógv eldri fólk, sum búgva í egnum sethúsum, fegin vilja hava okkurt minni at búgva í, men at leigukostnaðirnir eru so høgir, at fólkapensjónin ikki røkkur til.

Almanna- og bústaðamálaráðið er samt í, at tað kunnu vera húski, sum hava tørv á einum hægri stuðli enn tað, sum hetta lógaruppskotið heimilar. Men av tí, at hagtalsgrundarlagið undir bústaðarmynstrinum og hagtalsgrundarlagið um leigubústaðamarknaðin er veikt, er trupult at meta neyvt um fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum. Landsstýriskvinnan hevur ein fíggjarligan karm at halda seg til, og tí er avgerð tikin um at byrja varliga fyri at fyribyrgja, at útreiðslurnar í sambandi við leigustuðulin gerast størri enn tað, sum er sett av til endamálið í løgtingsfíggjarlógini.

Landsfelag Pensjónista vísir harafturat á, at fyri at skipanin við leigustuðli skal gerast so rættvís sum møguligt, eiga allir leigusáttmálar at verða góðkendir av einari kommunalt góðkendari húsaleigunevnd, áðrenn leigustuðulin kann verða latin.

Almanna- og bústaðamálaráðið skal í hesum sambandi vísa á, at leigunevndin í sambandi við kærur, sambært § 26, stk. 1, nr. 1 í leigulógini, kann seta leiguna, sum partarnir sínámillum hava avtalað, niður, um leigan verður mett at vera greitt órímilig, eins og leigunevndin, sambært § 26, stk. 1, nr. 2, heilt ella lutvíst kann strika eina hækking av húsaleiguni, um hækkingin ikki verður mett at vera rímilig. Tað eru sostatt longu skipanir at hava eftirlit við støddini á húsaleigum í Føroyum, og í løtuni eru ongar ætlanir um at seta aðrar skipanir í verk,

eitt nú skipanina, sum Landsfelag Pensjonista skjýtur upp. Almanna- og bústaðamálaráðið hevur tí ikki tikið hesa viðmerkingina frá Landsfelag Pensjónista til eftirtektar.

Landsbanki Føroya tekur sum heild undir við lógaruppskotinum. Landsbankin metir uppskotið vera eitt stig rætta vegin, tá tað snýr seg um at javnseta eigarar av bústøðum við leigarar av bústøðum. Landsbankin metir tað tó vera neyðugt at hava eina aðra mótrokningarskipan fyri fólk í pensjónsaldri, tí inntøkugrundarlagið hjá fólkapensjónistum roynist betur enn vanlig arbeiðsinntøka. Partur av fólkapensjónini er nevniliga ikki skattskyldugur, eins og fólkapensjónistar ikki rinda arbeiðsmarknaðargjøld.

Almanna- og bústaðamálaráðið skal vísa á, at fólkapensjónin telur við í inntøkugrundarlagnum, tá leigustuðul skal roknast, men sum Landsbankin vísir á, hava fólkapensjónistar lagaligari skattatreytir enn løntakarar, og tí verður munur á leigustuðlinum, hóast inntøkugrundarlagið er tað sama.

Dømi við húsaleigu uppá 8.000 kr. um mánaðin: Ein stakur persónur (løntakari) og ein fólkapensjónistur, sum báðir hava inntøkugrundarlag upp á 400.000 kr., fáa 1.292 kr. í leigustuðli. Løntakarin hevur inntøku aftaná skatt og gjøld upp á umleið 20.650 kr. um mánaðin. Inntøkan hjá fólkapensjónistinum aftaná skatt og gjøld er umleið 23.550 kr. um mánaðin. Orsøkin til, at fólkapensjónisturin hevur hægri inntøku eftir skatt og gjøld er, at grundupphæddin er skattafrí, at fólkapensjónisturin hevur ein frádrátt í skattinum, og at hann harafturat ikki rindar arbeiðsmarknaðargjøld.

Tað eru aðrir bólkar, so sum fyritíðarpensjónistar og lesandi, sum hava serligar skattatreytir, sum eru øðrvísi enn treytirnar hjá fólkapensjónistum. Fyri at hava skipanina so einfalda og gjøgnumskygda sum gjørligt, hevur landsstýriskvinnan tikið avgerð um at halda fast við einari mótrokningarskipan.

Landsbanki Føroya mælir í ummælinum eisini til at áseta eitt mark fyri ogn og fíggjarogn, soleiðis at húski, ið eru fíggjarliga væl fyri, ikki fáa rætt til leigustuðul við uppskotinum. Landsbankin vísir á, at seinnu árini eru møguleikarnir hjá eldri fólki at leiga ein bústað bøttir munandi. Nøkur teirra eiga tó framvegis ein annan bústað, eins og nøkur hava stórar fíggjarognir.

Almanna- og bústaðamálaráðið skal í hesum sambandi vísa á, at eitt av endamálunum við uppskotinum er at gera umbýtið av bústøðum størri, og at geva teimum, sum ikki longur hava tørv á t.d. einum sethúsum, eitt alternativ á leigubústaðamarkaðinum. Verður eitt mark fyri fíggjarogn ásett, kann tað ávirka hugin at selja sín bústað. Hinvegin verður mett rímiligt at áseta, at leigustuðul ikki verður veittur húskjum, sum eiga aðra fastogn, ið kann nýtast sum bústaður. Almanna- og bústaðamálaráðið hevur tí tikið avgerð um at broyta uppskotið við at seta sum treyt fyri leigustuðlinum, at húskið ikki eigur nakra fastogn, ið kann nýtast sum bústaður.

Landsbanki Føroya vísir harafturat á, at stakir uppihaldarar kunnu fara at verða mótroknaðir í trimum veitingum/rættindum í senn, og at hetta kann verða arbeiðsforðandi. Talan er um familjuískoyti, fíggjarligt fríplás á dagstovni og við hesum uppskotinum eisini leigustuðul. Fyri at forða fyri, at stakir uppihaldarar koma í eina støðu, har tað als ikki loysir seg at arbeiða, mælir Landsbankin til, at tað verða gjørdar útrokningar, sum vísa, hvussu hesar tríggjar mótrokningarskipanirnar fara at virka saman við skattaskipanini.

Almanna- og bústaðamálaráðið ásannar, at tað eru dømi um, at stakir uppihaldarar koma í eina støðu, har tað illa lønar seg at arbeiða. Hetta er eisini orsøkin til, at mótrokningin sambært uppskotinum til § 4 bara er 5 %. Mótrokning av familjuískoyti til stakar uppihaldarar steðgar við 290.000 kr., meðan mótrokning av leigustuðli byrjar við 350.000 kr., og sostatt umskarast mótrokningin av hesum báðum skipanunum ikki. Ein stakur uppihaldari við inntøku lægri enn umleið 340.000 kr. rindar einki egingjald til dagstovn. Egingjaldið hækkar stigvíst við inntøkum hægri enn 340.000 kr., og tískil kann stigvíst egingjald umskarast við mótrokning av leigustuðli. Fíggjarligt fripláss og leigustuðul ávirka ikki beinleiðis hvørt annað. Fíggjarligt fripláss er ikki ein beinleiðis veiting og telur sostatt ikki við í inntøkugrundarlagið, tá leigustuðul skal roknast. Og leigustuðul telur heldur ikki sum inntøka, tá rætturin til fíggjarligt fripláss skal ásetast. Men effektivi markskatturin verður ávirkaður hjá teimum, sum verða mótroknað í leigustuðli, og sum samstundis fáa lutvíst fíggjarligt fripláss.

Almanna- og bústaðamálaráðið hevur lutvíst tikið viðmerkingina frá Landsbankanum til eftirtektar, og viðmerkingarnar til uppskotið eru broyttar soleiðis, at samanhangurin millum skipanirnar er týðiligari.

MARK vísir í ummæli sínum á, at leigustuðul einans eigur at verða veittur í sambandi við leigubústaðir, sum eru bygdir til endamálið, og sum eru tryggir og heilsuliga forsvarligir at búgva í. Sambært MARK eigur leigustuðul tí bara at verða veittur til leigubústaðir, sum hava egið vesi við brúsu, egnan køk, egna inngongd, nøktandi parkeringsviðurskifti og nøktandi brunatrygd.

Almanna- og bústaðamálaráðið skal vísa á, at sambært lógaruppskotinum verður leigustuðul bara veittur til persónar og húski, sum búgva í sjálvstøðugum íbúðum við egnum køki. Almanna- og bústaðamálaráðið ásannar, at tað eru fyrimunir við at seta enn fleiri krøv til bústaðin, sum leigustuðul verður veittur til, tí hetta kann eitt nú eggja útleigarar til at fremja ábøtur á bústaðin. Hinvegin hevur lógaruppskotið eitt sosialpolitiskt høvuðsendamál, sum er at betra um fíggjarligu umstøðurnar hjá teimum húskjum, sum eru ringast fyri. Nøkur av hesum húskjum búgva í bústøðum, sum ikki eru nøktandi. Landsstýriskvinnan er greið um, at hesi eisini skulu hava ágóðan av leigustuðlinum, og hendan viðmerkingin hjá MARK verður tí ikki tikin til eftirtektar.

MARK vísir eisini á, at leigustuðul bara eigur at verða veittur leigarum, sum búgva í bústøðum, sum eingin stuðul er latin til frammanundan. Hetta fyri ikki at skeikla kappingina á bústaðarmarknaðinum og fyri at fáa samsvar í lóggávuna.

Almanna- og bústaðamálaráðið skal viðmerkja, at leigustuðulin sambært uppskotinum skal síggjast sum eitt sosialpolitiskt amboð heldur enn eitt vinnupolitiskt amboð. Leigustuðulin verður latin eftir tørvi, og ikki eftir hvørjum slagi av bústaði leigarin býr í. Tvey húski við somu inntøku og somu húsaleigu fáa við hesum uppskotinum rætt til somu veiting frá tí almenna. At útihýsa teimum, sum búgva í einum bústaði, sum er stuðlaður frammanundan, merkir, at nøkur húski við lágum inntøkum ikki fara at fáa leigustuðul, bara tí tey búgva hjá einum ávísum útleigara. Hetta sampakkar ikki við politiska endamálið, og viðmerkingin er tí ikki tikin til eftirtektar.

Føroya Arbeiðsgevarafelag vísir í ummælinum á, at ein skipan við leigustuðli eigur at avloysa alment stuðlaðar byggiverkætlanir – ikki at verða sett aftrat tílíkum verkætlanum. Føroya Arbeiðsgevarafelag sipar í hesum sambandi serliga til sonevnd almannagagnlig bústaðafeløg, sum ikki hava eitt almannagagnlig endamál, tí øll, sum búgva í hesum bústøðunum, fáa ágóðan

av stuðlinum – eisini tey vælbjargaðu, sum ikki hava tørv á honum. Føroya Arbeiðsgevarafelag vísir á, at sosialpolitikkur eigur at snúgva seg um tey, sum hava størsta tørvin.

Almanna- og bústaðamálaráðið metir, at atfinningarnar móti skipanini við almannagagnligum bústaðafeløgum er eitt mál í sjálvum sær, sum ikki neyðturviliga er í andsøgn við hetta uppskotið. Hetta lógaruppskotið hevur eitt sosialpolitiskt endamál, og leigustuðulin verður avmarkaður til persónar og húski við lág- og miðalinntøkum. Endamálið er at stuðla fólkum – ikki ávísum bústøðum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur eisini, at leigustuðulin bara eigur at stuðla láginntøkubólkum og ikki teimum við hægri inntøkum. Í uppskotinum, sum er sent til ummælis, lækkar stuðulin stigvíst í mun til inntøkuna, men fellur ikki burtur, fyrr enn inntøkugrundarlagið hjá støkum er omanfyri 638.000 kr. um árið, og inntøkugrundarlagið hjá húskjum við tveimum ella fleiri persónum yvir 18 ár er omanfyri 788.000 kr. um árið. Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at tað hevði verið skilabetri at lækka inntøkumarkið, so uppskotið í størri mun fer at stuðla teimum, sum veruliga hava tørv á stuðli, og ikki teimum við teim hægstu inntøkunum.

Almanna- og bústaðamálaráðið skal í hesum sambandi upplýsa, at politiska ynskið er, at húski við miðalinntøkum eisini skulu hava ágóðan av leigustuðlinum, tí tað eru eisini húski við miðalinntøkum, sum stríðast við at fáa endarnar at røkka saman. Markið fyri mótrokning hjá støkum er sett til 350.000 kr. Markið tekur hædd fyri skipanini við familjuískoyti, har mótroknað verður upp til 290.000 kr. Tað er óheppið, at mótrokning av familjuískoyti og mótrokning av leigustuðli umskarast, tí effektivi markskatturin verður tá ov høgur.

Leigustuðulin hjá støkum fellur burtur, tá inntøkan fer upp um 638.000 kr. Landsstýriskvinnan er samd í, at inntøkan er lutfalsliga høg, áðrenn leigustuðulin fellur burtur, men havast skal í huga, at tá inntøkan er so høg, er kann leigustuðulin í mesta lagi vera 300 kr. um mánaðin. Skal leigustuðulin fella burtur fyrr, eru tveir møguleikar:

- At broyta mótrokningina soleiðis, at hon verður hægri enn 5 %.
- At hækka upphæddina í § 4, stk. 3 soleiðis, at leigustuðulin fellur burtur, áðrenn upphæddin er komin niður á 300 kr.

Báðir hesir møguleikar hava aðrar óhepnar avleiðingar, og tí verður hildið fast við verandi ásetingar. Ein hægri mótrokning er tað sama sum hægri effektivur markskattur, sum kann væntast at hava negativa ávirkan á arbeiðsvirknið. Eisini skal eitt mark fyri, nær ein veiting fellur burtur, ásetast við varsemi, tí tá inntøkan fer ein krónu upp um markið, fellur ein størri upphædd burtur. Í hesum uppskotinum fellur leigustuðulin burtur, tá útroknaði stuðulin er lægri enn 300 kr. Er upphæddin ov høg, sum fellur burtur í einum, kann tað ávirka atburðin á arbeiðsmarknaðinum, eins og tað kann tykjast órímiligt.

Markið fyri mótrokning hjá húskjum við tveimum ella fleiri persónum yvir 18 ár byrjar við 500.000 kr., og leigustuðulin fellur burtur, tá inntøkan fer upp um 788.000 kr. Pør og húski við hesum inntøkum, sum búgva í leigubústaði, kunnu hava fíggjarliga trong kor, og tí verður hildið fast við verandi inntøkumørk.

Almanna- og bústaðamálaráðið metir samanumtikið, at viðmerkingarnar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag ikki eru orsøk til at gera broytingar í lógaruppskotinum.

Bústaðir taka undir við uppskotinum og vísa á, at tað kann viðvirka til ein meira skipaðan og tryggan leigumarknað. Bústaðir mælir til greiðar vegleiðingar, varsemi við árligari skjalprógvan og gott samsvar við aðrar stuðulsskipanir.

Almanna- og bústaðamálaráðið er samt við Bústaðir, og uppskotið er sostatt orðað í samsvar við viðmerkingarnar frá Bústøðum. Almannaverkið hevur umvegis Fólkayvirlitið upplýsingar um, hvør er skrásettur at búgva í bústaðnum, og Almannaverkið hevur eisini umvegis TAKS upplýsingar um inntøkur hjá teimum, sum búgva í bústaðnum. Tað merkir, at Almannaverkið hevur atgongd til ein stóran part av upplýsingunum, sum eru neyðugar fyri at avgreiða umsóknir um leigustuðul. Men leigustuðul er sum kunnugt roknaður sum prosentpartur av goldnari húsaleigu, og Almannaverkið hevur ikki upplýsingar um húsaleigu hjá umsøkjarum. Tískil er neyðugt, at umsøkjari við jøvnum millumbilum upplýsir fyri Almannaverkinum goldnu húsaleiguna.

Eisini skal **Almanna- og bústaðamálaráðið** vísa á, at fyri at avmarka ávirkanina á aðrar stuðulsskipanir, sum eisini eru skipaðar við mótrokning, er ásett, at leigustuðul einans verður mótroknaður við 5 %. Harnæst verða fylgilógarbroytingar gjørdar í aðrari lóggávu, soleiðis at rætturin til aðrar almannaveitingar ikki verður ávirkaður.

Almannaverkið vísir í ummælinum á, at leigustuðulin fer at ávirka rættin hjá teimum, ið eru í arbeiðsbúgving sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.

Almanna- og bústaðamálaráðið skal viðmerkja, at í uppskotinum, ið varð sent til ummælis, stóð, at leigustuðulin ikki skuldi ávirka rættin til aðrar almannaveitingar, og at tað tí skuldu gerast fylgibroytingar í almannalógini og løgtingslóg um familjuískoyti. Tað hevur ongantíð verið ætlanin, at leigustuðulin skuldi ávirka rættin hjá persónum í arbeiðsbúgving. Tí verður eisini gjørd ein fylgibroyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk í sambandi við lógaruppskotið.

Almannaverkið vísir somuleiðis á, at tað er ógreitt, hvussu leigustuðulin fer at ávirka rættin til persónliga viðbót sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a. og rættin til stuðul til stakútreiðslur sambært almannalógini.

Almanna- og bústaðamálaráðið kann í hesum sambandi upplýsa, at ætlanin er at gera tillagingar í kunngerð um persónliga viðbót, áðrenn løgtingslógin kemur í gildi, soleiðis at eingin ivi verður um rættindini. Somuleiðis er ætlanin at gera eina nýggja kunngerð um stuðul til stakútreiðslur, sambært § 19 í almannalógini, sum tekur hædd fyri leigustuðlinum.

Almannaverkið ger í ummælinum harafturat vart við, at heimild er til í serligum førum at veita stuðul til høgar bústaðarútreiðslur. Heimildin er sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk og sambært almannalógini, har nærri reglur eru ásettar í kunngerð um ískoyti til høgar bústaðarútreiðslur. Eisini eru pensjónistar, sum í ávísan mun kunnu fáa stuðul til bústaðarútreiðslur sambært kunngerð um persónliga viðbót. Almannaverkið spyr tí, um tann stuðulin fer at telja sum inntøka í sambandi við umsókn um leigustuðul.

Almanna- og bústaðamálaráðið kann upplýsa, at ætlanin eisini er at tillaga kunngerð um høgar bústaðarútreiðslur, so tað ikki verður gjørligt at fáa stuðul sambært kunngerðini og stuðul sambært hesum uppskotinum í senn. Almanna- og bústaðamálaráðið skal tó samstundis vísa á, at tað er lítið sannlíkt, at fíggjarligt ískoyti til høgar bústaðarútreiðslur og persónlig viðbót fer at ávirka upphæddina, sum verður veitt í leigustuðli. Ein stakur persónur við

inntøkugrundarlagi lægri enn 350.000 kr. fær fullan leigustuðul. Pensjónistar, sum fáa persónliga viðbót, og persónar við fyribils uppihaldsveiting ella varandi uppihaldsveiting, sum fáa ískoyti til høgar bústaðarútreiðslur, hava inntøkur, sum eru munandi lægri enn markið fyri mótrokning, og tá hevur tað ikki týdning, um ískoytið ella persónliga viðbótin telur sum inntøka.

Ætlanin er sum nevnt, at leigustuðulin ikki skal telja sum inntøka í sambandi við fyribils uppihaldsveiting sambært almannalógini ella arbeiðsbúgvingarveiting sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. **Almannaverkið** ger í ummælinum vart við, at sambært galdandi lóg verður rentustuðul drigin frá fyribils uppihaldsveitingini og arbeiðsbúgvingarveitingini. Tað merkir, at rentustuðulin verður roknaður sum inntøka, meðan leigustuðulin ikki fer at verða roknaður sum inntøka.

Almanna- og bústaðamálaráðið skal í hesum sambandi upplýsa, at ætlanin er ikki í hesum umfari at broyta almannalógina og løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk fyri at javnseta rentustuðulin við leigustuðulin í sambandi við mótrokning. Rentustuðul og leigustuðul verða ikki tvær javnsettar skipanir, og hóast nýggju skipanina við leigustuðli, verður tað yvirskipað sæð framvegis ein fíggjarligur fyrimunur at eiga ein bústað, m.a. tí eigarin fær ágóðan av virðisøking av bústaðnum.

Heilsuhjálparafelag Føroya vísir í ummælinum á týdningin av, at leigustuðulin virkar saman við øðrum almannaveitingum uttan at skapa óhepnar mótrokningar ella støður, har fólk í praksis fara at standa verri enn áður.

Almanna- og bústaðamálaráðið skal í hesum sambandi viðmerkja, at mótrokningarprosentið í uppskotinum er sett til einans 5 %, fyri at ávirkanin á effektiva markskattin skal vera so avmarkað sum gjørligt.

Almanna- og bústaðamálaráðið skal harafturat gera vart við, at uppskotið tekur atlit at mótrokning av familjuískoyti. Hjá støkum verður familjuískoytið mótroknað upp til 290.000 kr., meðan mótrokning av leigustuðli byrjar við 350.000 kr. Hjá einum pari verður familjuískoytið mótroknað upp til 390.000 kr. (410.000 kr. hjá teimum við 3 ella fleiri børnum). Í húskjum við tveimum ella fleiri persónum yvir 18 ár byrjar mótrokning av leigustuðli við 500.000 kr. Sostatt umskarast mótrokning av leigustuðli ikki við mótrokning av familjuískoyti.

Viðkomandi er eisini at nevna skipanina við fíggjarligum fríplássi á dagstovni, sum eisini verður veitt eftir inntøku. **Almanna- og bústaðamálaráðið** skal vísa á, at leigustuðul ikki ávirkar rættin til frípláss, og øvut ávirkar frípláss ikki rættin til leigustuðul. Tó fella inntøkumørkini í sambandi við frípláss saman við mørkunum í hesum uppskotinum, og tað ávirkar upphæddina, sum húskini hava eftir aftaná skatt og gjøld. Tað verður tó ikki soleiðis, at nakar fer at standa verri fíggjarliga, av tí at løgtingslóg um leigustuðul verður sett í gildi.

Heilsuhjálparafelag Føroya vísir harafturat á, at tað er umráðandi, at skipanin er fult virkin frá gildiskomudegnum, og at borgarar fáa greiða kunning í góðari tíð um, hvussu søkjast kann, og hvat krevst.

Almanna- og bústaðamálaráðið skal í hesum sambandi viðmerkja, at í lógaruppskotinum er gildiskoman ásett at vera 1. september 2026, men so skjótt uppskotið er samtykt, fer Almannaverkið undir at fyrireika verksetanina av løgtingslógini, seta starvsfólkaorku av til endamálið, gera neyðugar forritanir í KT-skipanini, gera umsóknarblað og kunna almenningin

um skipanina. Tað kann væntast, at talið á umsóknum, ið skulu viðgerast fyrstu mánaðirnar, verður sera stórt, og at viðgerðartíðin sostatt verður eitt sindur drúgvari enn vanligt.

Áhugafelagið Lutaíbúðir vísir í ummælinum á, at leigustuðulin eigur at verða tillagaður eftir veruliga tørvi umsøkjarans. At tað er upphæddin, sum umsøkjarin hevur eftir til taks eftir skjalprógvaðar útreiðslur, sum eigur at hava týdning fyri støddina á leigustuðlinum.

Almanna- og bústaðamálaráðið skal í hesum sambandi viðmerkja, at farið varð burtur frá tørvsmettum almannaveitingum í 2013. Høvuðsgrundgevingin var tá, at skipanin var umsitingarliga tung og ógjøgnumskygd. Harafturat skal vísast á, at meginreglan við tørvsmettum veitingum er, at hægri útreiðslur hava við sær hægri stuðul frá tí almenna. Hetta verður ikki mett at vera ein skynsom skipan. Almanna- og bústaðamálaráðið skal tó vísa á, at tað í serligum førum kann vera neyðugt við skipanum, ið taka hædd fyri ítøkiligu støðuni hjá teirri einstøku familjuni. Við hesum uppskotinum verður talan tó ikki um serlig føri, tí leigustuðul kann væntast at fara at verða veittur til ein stóran part av føroyskum húskjum, sum búgva í leigubústaði. Skuldu allir umsøkjarar skjalprógvað útreiðslur, og skuldi ein útrokning verði gjørd í hvørjum einstøkum føri, hevði tað havt við sær sera víðfevndar umsitingarligar avleiðingar. Almanna- og bústaðamálaráðið hevur tí ikki tikið hesa viðmerkingina til eftirtektar.

Áhugafelagið Lutaíbúðir metir, at hægst møguligi leigustuðulin, sum er 1.500 kr. um mánaðin, er nóg mikið hjá summum, men ov lítið hjá øðrum. Áhugafelagið mælir tí til at endurskoða upphæddina.

Almanna- og bústaðamálaráðið er samt í, at tað kunnu vera húski, sum hava tørv á einum hægri stuðli enn tað, sum hetta lógaruppskotið heimilar. Men av tí, at hagtalsgrundarlagið undir bústaðarmynstrinum og hagtalsgrundarlagið um leigubústaðamarknaðin er veikt, er trupult at meta neyvt um fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum. Landsstýriskvinnan hevur ein fíggjarligan karm at halda seg til, og tí er avgerð tikin um at byrja varliga fyri at fyribyrgja, at útreiðslurnar í sambandi við leigustuðulin gerast størri enn tað, sum er sett av til endamálið í løgtingsfíggjarlógini.

Áhugafelagið Lutaíbúðir vísir eisini á, at upphæddin, sum ein persónur kann eiga, uttan at missa rættin til leigustuðul, er alt ov lág.

Almanna- og bústaðamálaráðið skal í hesum sambandi viðmerkja, at áhugafelagið sannlíkt hevur misskilt § 5 í lógaruppskotinum, sum ásetur útrokning av inntøkugrundarlagnum hjá umsøkjara. Útrokningin av inntøkugrundarlagnum verður gjørd sambært § 7 í løgtingslóg um familjuískoyti. § 11 í løgtingslóg um familjuískoyti hevur ásetingar um ogn, men § 11 er ikki viðkomandi fyri hetta uppskotið.

Áhugafelagið Lutaíbúðir vísir í ummælinum á, hvussu inntøkugrundarlagið verður gjørt upp í Danmark og øðrum Norðurlondum.

Almanna- og bústaðamálaráðið skilir hesa viðmerkingina sum, at hetta lógaruppskotið eigur at hava skipanirnar í grannalondunum sum fyrimynd. Almanna- og bústaðamálaráðið skal tó vísa á, at ásetingin av inntøkugrundarlagnum í sambandi við leigustuðulin verður gjørd á sama hátt sum við familjuískoytinum. Talan er um eina umsitingarliga einfalda og sjálvvirkandi skipan, har leigustuðulin hvønn mánað verður ásettur við støði í inntøkuni seinastu 12 mánaðirnar. Tá inntøkan broytist, broytist leigustuðulin sostatt sjálvvirkandi, um

inntøkubroytingin hevur ávirkan á støddina á leigustuðlinum. Talan er um eina skipan, ið umsitingarliga er munandi einfaldari enn skipanirnar í grannalondunum.

Verkafólk vísir í ummælinum á møguleikan at brúka arbeiðaraløn í sambandi við markið fyri mótrokning. Sambært lógaruppskotinum verður hjá støkum mótroknað við 5 % fyri inntøku, ið er omanfyri 350.000 kr. Verkafólk vísir á møguleikan fyri at brúka arbeiðaraløna sum útgangsstøði fyri markinum heldur enn at brúka ítøkiligu upphæddina sambært lógaruppskotinum. Verkafólk skrivar, at t.d. kann mótrokning hjá einum støkum persóni vera fyri inntøku, ið er hægri enn 1,25 arbeiðaraløn, og tá talan er um pør, kunnu tvær arbeiðaraløni vera útgangsstøðið fyri mótrokning. Ein grundgeving fyri uppskotinum hjá Verkafólki er, at leigustuðul verður knýttur at inntøkuáseting, og at tað onkursvegna fylgir gongdini á arbeiðsmarknaðinum.

Almanna- og bústaðamálaráðið skal fyrst gera vart við, at við 1,25 arbeiðaraløn og 2 arbeiðaralønum, sum Verkafólk skjýtur upp, høvdu mørkini fyri mótrokning verið meira enn 100.000 kr. hægri hjá støkum og meira enn 200.000 kr. hægri hjá húskjum við 2 ella fleiri persónum yvir 18 ár. Hetta hevði havt við sær, at húski við høgum inntøkum høvdu fingið rætt til leigustuðul, og hetta samsvarar ikki við politiska ynskið við uppskotinum.

Verkafólk vísir eisini á, at hugtakið *arbeiðarainntøka* longu verður brúkt aðrastaðni í almannalóggávuni, eitt nú í sjúkradagpeningalógini, og tí er talan ikki um nýtt ella fremmant hugtak.

Almanna- og bústaðamálaráðið skal í hesum sambandi viðmerkja, at javning av almannaveitingum er komin í eina fasta legu, og at flest allar almannaveitingar og inntøkumørk á almannaøkinum verða javnað tann 1. januar á hvørjum ári sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar. Javningarprosent til almannaveitingar verður roknað sum miðaltalið av prosentvísu broytingini í lønarkarminum hjá Fíggjarmálaráðnum og prosentvísu broytingini í brúkaraprístalinum. Sostatt fylgir javningin av almannaveitingum í ávísan mun longu lønargongdini á arbeiðsmarknaðinum.

Ein árlig arbeiðaraløn verður ikki brúkt aðrastaðni í almannalóggávuni í sambandi við t.d. javning, og tað er ongastaðni í almannalóggávuni ásett neyvt, hvussu ein árlig arbeiðaraløn skal roknast. Hægst møguliga dagpeningaupphædd er ein vikuupphædd, og verður hon ásett sum 80 % av eini arbeiðaraløn. Upphæddin hækkar vanliga 1. mai á hvørjum ári, tá tímalønin vanliga hækkar. Verandi javningarleistur er greiðari, og tí verða hesar viðmerkingarnar frá Verkafólki ikki tiknar til eftirtektar.

Verkafólk mælir harafturat til at gera uppskot um loft á leigu og mark á, hvussu nógv leigukostnaðurin kann hækka í einum ári. Harumframt mælir Verkafólk til at gera ymsar dagføringar í løgtingslóg um familjuískoyti.

Almanna- og bústaðamálaráðið skal vísa á, at hesar viðmerkingar ikki eru viðkomandi fyri hetta lógaruppskotið, og at tær tí ikki verða nærri viðgjørdar her.

Bogi Holm Mikkelsen hevur sum privatpersónur sent Almanna- og heilsumálaráðnum (nú: Almanna- og bústaðamálaráðið) eitt ummæli, har hann vísir á, at tað er neyðugt at tillaga aðra lóggávu, soleiðis at borgarar ikki verða viðgjørdir ymiskt. Eins og Almannaverkið vísir Bogi Holm Mikkelsen á, at rentustuðul verður mótroknaður í fyribils uppihaldsveiting, men hann leggur aftrat, at mótroknað verður við faktor 1,5.

Almanna- og bústaðamálaráðið skal í hesum sambandi gera vart við, at almannalógin varð broytt í mars 2025 (løgtingslóg nr. 45 frá 27. mars 2025), soleiðis at rentustuðul ikki longur skal faldast við 1,5, tá hann verður drigin frá uppihaldsveitingini. Fylgibroyting verður gjørd í almannalógini sambandi við hetta lógaruppskotið, so leigustuðul ikki verður roknaður sum inntøka, ið skal mótroknast í fyribils uppihaldsveitingini. Sostatt fer leigustuðulin ikki at ávirka rættin til fyribils uppihaldsveiting. Tað merkir so eisini, at tað verður munur á rentustuðli og leigustuðli í sambandi við fyribils uppihaldsveiting. Skipanirnar við leigustuðli og rentustuðli eru ikki ætlaðar sum tvær javnsettar skipanir, og hóast nýggju skipanina við leigustuðli, verður tað yvirskipað sæð framvegis ein fíggjarligur fyrimunur at eiga ein bústað, m.a. tí eigarin fær ágóðan av virðisøking av bústaðnum.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Tað ber ikki til at meta neyvt um fíggjarligu avleiðingarnar av lógaruppskotinum fyri landskassan.

Partur av leigumarknaðinum er heldur óskipaður, og tað er hugsandi, at tað eru lutfalsliga nógvar búeindir, sum ikki eru frámatrikuleraðar, eins og tað kunnu vera leiguinntøkur, ið ikki eru skrásettar hjá TAKS. Tað er tí stór óvissa um samlaða talið á leigubústøðum. Inntøkugrundarlagið hjá teimum, sum búgva í leigubústaði, eru heldur ongar upplýsingar um.

Sambært TAKS vóru tað í 2024 umleið 1150 matriklar við leigubústøðum við umleið 92 mió. kr. í leiguinntøkum. Hetta gevur ein miðal leigukostnað uppá knappar 6.700 kr. um mánaðin. Men talið á privatum leigubústøðum er helst eitt sindur hægri enn 1150, tí tað kunnu vera fleiri leigumál á sama matrikli, og sostatt kann miðal leigukostnaðurin eisini vera eitt sindur lægri. Harumframt eru leysliga mett umleið 700-800 vinnulig leigumál, har meginparturin er hjá *Bústøðum* og *MARK*.

Tað ber sum nevnt ikki til at siga nakað um inntøkuviðurskiftini hjá teimum, sum búgva í leigubústøðum, og harvið ber heldur ikki til at siga, í hvønn mun hesi húskini fara at fáa rætt til leigustuðul.

Verða tað til dømis 1000 húski, sum í miðal fara at fáa 1.000 kr. um mánaðin, verða árligu útreiðslurnar til leigustuðul 12 mió. kr.

Verða tað 1200 húski, sum í miðal fara at fáa 1.200 kr. um mánaðin, verða árligu útreiðslurnar uml. 17 mió. kr.

Ætlanin er, at henda løgtingslóg skal koma í gildi 1. september í 2026. Leigustuðul verður veittur frá mánaðinum eftir, at Almannaverkið hevur móttikið umsóknina, og verður rindaður mánaðarliga afturúr. Tí væntast fyrstu húskini at fáa útgjald fyri oktober. Sostatt verður leigustuðul í mesta lagi útgoldin í 3 mánaðir í 2026.

Umsitingarligu og fíggjarligu avleiðingarnar fyri Almannaverkið eru sjálvsagt treytaðar av talinum á umsøkjarum, og tað ber ikki til at meta um hetta frammanundan. Verða tað 1000-1200 leigumál, sum fara at fáa leigustuðul, væntar Almannaverkið, at neyðugt verður við 2-4 starvsfólkum at umsita málini. Serliga fyrstu tíðina kann arbeiðsbyrðan væntast at verða stór.

Avgerðir hjá Almannaverkinum um leigustuðul fara við uppskotinum til § 12 at kunna kærast til Føroya Kærustovn. Kærustovnurin hevur mett, at tað kunnu roknast við at verða umleið 20 kærur árliga, og at kostnaðurin fyri hetta verður 200 tús. kr. um árið.

Lógaruppskotið hevur ikki við sær fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur við sær umsitingarligar avleiðingar fyri landið. Almannaverkið fer umsita leigustuðulin. Útrokningin av leigustuðlinum verður gjørd eftir somu skipan sum familjuískoyti. Inntøkugrundarlagið hevur sama lógargrundarlag, og útrokningin fer, eins og við familjuískoyti, fram sjálvvirkandi.

Tá eitt húski søkir um leigustuðul, skal ein undirskrivaður leigusáttmáli fáast til vegar, eftirkannast og skrásetast. Í hesum sambandi kann væntast eitt ávíst samskifti millum Almannaverkið, umsøkjara og útleigara.

Einaferð um árið skal húskið skjalprógva veruligu útreiðslurnar til húsaleigu seinasta árið.

Tá eitt húski flytur til annan leigubústað, skal søkjast av nýggjum, og nýggjur leigusáttmáli skal útvegast.

Umsitingarligu avleiðingarnar eru treytaðar av tali á umsøkjarum, og hetta er eitt tal, sum tað ikki ber til at meta um. Verða tað 1000-1200 leigumál, sum fara at fáa leigustuðul, væntar Almannaverkið, at neyðugt verður við 2-4 starvsfólkum at umsita málini. Serliga fyrstu tíðina kann arbeiðsbyrðan væntast at verða stór.

Hóast leigustuðul verður roknaður eftir somu meginreglum sum familjuískoyti, verður neyðugt við tillagingum av KT-skipanini hjá Almannaverkinum. Leigustuðul hevur onnur inntøkumørk, annað mótrokningarprosent, og eisini eru aðrar treytir galdandi. Sambært Almannaverkinum væntast útreiðslur til tillagingar av KT-skipanini at verða umleið 150 tús. kr.

Lógaruppskotið leggur harafturat umsitingarligar byrðar á Føroya Kærustovn, tí kærustovnurin hevur mett, at tað verða umleið 20 kærur um leigustuðul at viðgera árliga.

Lógaruppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ongar beinleiðis avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur serligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur positivar avleiðingar fyri fólk, ið búgva til leigu, sum frameftir kunnu fáa upp til 1.500 kr. í leigustuðli um mánaðin.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Eingir millumtjóðasáttmálar eru viðkomandi fyri hetta lógaruppskotið.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Lógaruppskotið er í samsvari við Evropeiska mannarættindasáttmálan og ST-sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar og flytføri
Lógaruppskotið hevur ongar markaforðingar við sær og ávirkar ikki flytførið á nakran hátt.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Við uppskotinum til § 11, stk. 3 og 4 fer TAKS at kunna krevja afturgjaldskrøv í sambandi við stuðul, ið er móttikin av órøttum, inn við panting ella við at afturhalda í A-inntøkuni.

Tó at trupult er at seta nakað neyvt tal á, verður roknað við, at rættiliga nógv fólk fara at fáa rætt til leigustuðul við uppskotinum, tí tað eru sannlíkt millum 2000 og 3000 leigumál tilsamans á privata og almenna leigubústaðamarknaðinum í Føroyum. Sannlíkt verða tí eisini lutfalsliga nógv krøv um afturrindan av stuðli, ið er móttikin av órøttum. Neyðugt er tí hjá landinum at hava sterk amboð og góðar møguleikar at heinta krøvini inn.

Viðmerkjast skal tó, at panting og afturhald í A-inntøkuni bara skal nýtast, tá aðrir, minni inntrívandi møguleikar eru troyttir. Eitt nú skal Almannaverkið hava roynt at gjørt eina avtalu við skuldaran um afturgjaldsskipan av kravinum.

Í § 11, *stk. 4* verður ásett, at TAKS fremur panting sambært stk. 3 eftir eftir reglunum um innkrevjing av skattum og avgjøldum og afturheldur í A-inntøku sambært reglunum um lønarafturhald í skattalógini.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Skipanin við leigustuðli er sjálvboðin, og lógaruppskotið áleggur tí ikki likamligum persónum nakrar beinleiðis skyldur.

Fyri at móttaka leigustuðul má ein umsøkjari lata Almannaverkinum tær upplýsingar, ið eru neyðugar fyri at kunna gera av, um viðkomandi lýkur treytirnar fyri stuðlinum.

Hevur ein persónur móttikið stuðul av órøttum, hevur hann sambært uppskotinum skyldu at afturrinda Almannaverkinum upphæddina.

2.14. Leggur uppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki nakrar heimildir til landsstýrisfólkið ella kommunurnar.

Við lógaruppskotinum fær Almannaverkið heimild at krevja nærri upplýsingar og skjalprógv frá einum umsøkjara um, at treytirnar fyri leigustuðlinum eru loknar.

Almannaverkið fær eisini heimild at útvega sær upplýsingar av týdningi fyri viðgerð av umsóknum um leigustuðul frá skattamyndugleikum, Landsfólkayvirlitinum, kommunalum myndugleikum og øðrum viðkomandi myndugleikum. Í sambandi við avtalur um afturgjaldsskipan fær Almannaverkið harafturat heimild útvega sær upplýsingar um ognarviðurskiftini hjá skuldara frá TAKS og øðrum viðkomandi myndugleikum.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?

Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Heimilar uppskotið viðgerð av persónsupplýsingum?

Almannaverkið fær við lógaruppskotinum heimild at útvega sær upplýsingar av týdningi fyri viðgerð av málum um leigustuðul frá skattamyndugleikum, Landsfólkayvirlitinum, kommunalum myndugleikum og øðrum viðkomandi myndugleikum. Í sambandi við avtalur um afturgjaldsskipan fær Almannaverkið harafturat heimild at útvega sær upplýsingar um ognarviðurskiftini hjá skuldara frá TAKS og øðrum viðkomandi myndugleikum.

2.17. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Politiska ynskið er, at leigustuðulin ikki skal ávirka rættin til aðrar almannaveitingar. §§ 15-17 í lógaruppskotinum gera tí fylgilógarbroytingar í ávikavist almannalógini, løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk og løgtingslóg um familjuískoyti, so leigustuðulin ikki verður drigin frá fyribils uppihaldsveitingini, stuðulsveitingini sambært § 12 í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk ella familjuískoytinum.

Tað er somuleiðis eitt politiskt ynski, at leigustuðulin skal vera ein skattafrí veiting. Uppskotið til § 18 ger tí fylgilógarbroyting í skattalógini, so leigustuðulin verður undantikin skattskylduni.

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær omanfyri nevndu.

2.18. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

avtalur og reglur					
Sosialar avleiðingar	[redacted]		Nei	Ja	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Uppskotið til *§ 1* ásetur grundleggjandi treytirnar fyri rættinum til at fáa leigustuðul eftir løgtingslógini.

Treytirnar eru:

- At persónurin ella húskið býr til leigu sambært leigulógini
- í eini sjálvstøðugari íbúð við egnum køki,
- og at persónurin ella húskið ikki eigur aðra fastogn, ið kann nýtast sum bústaður.

Eitt *húski* skal í hesum lógaruppskotinum skiljast sum ein ella fleiri persónar, sum búgva saman í sama bústaði/sama leigumáli.

Tað er altíð ein treyt, at persónurin ella húskið býr í leigumálinum, sum tað verður søkt um leigustuðul til. Persónurin ella húskið skal vera skrásett at búgva í bústaðnum og skal harafturat *veruliga* búgva har.

Treytin um, at leigumálið skal vera *sambært leigulógini*, merkir m.a., at tað ikki fer at bera til at fáa leigustuðul í sambandi við stutttíðarleigumál. Stutttíðarleigumál eru leigumál, ið eru 3 mánaðir ella styttri. Leigulógin fevnir sambært § 1, stk. 3 í leigulógini ikki um tílík leigumál.

Fyri at fáa leigustuðul skal talan sostatt vera um langtíðarleigumál, ið er longur enn 3 mánaðir.

Treytin hevur harafturat m.a. tann týdning, at fyri at fáa leigustuðul skulu útleigari og leigari hava nýtt standard leigusáttmálan sambært § 3, stk. 2 í leigulógini. Hava útleigari og leigari ikki nýtt henda sáttmála, mugu partarnir gera nýggjan sáttmála við standard sáttmálanum, fyri at leigari skal hava rætt til leigustuðul.

Standard leigusáttmálin er at finna á heimasíðuni hjá leigunevndini: www.leigunevndin.fo.

Treytin um, at leigumálið skal vera sambært leigulógini, hevur sum endamál at tryggja, at leigustuðul bara verður veittur í sambandi við leigumál, ið eru partur av tí skipaða leigubústaðamarknaðinum. Mett verður, at ein tílík treyt kann virka tileggjandi og kann viðvirka til ein meira skipaðan leigubústaðamarknað í Føroyum.

At íbúðin skal vera *sjálvstøðug* og *við egnum køki* hevur sum endamál at avmarka leigustuðulin til veruligar leiguíbúðir.

Treytin hevur tann týdning, at persónar, sum eitt nú búgva í búfelagsskapi saman við øðrum persónum, ella sum bara leiga eitt kamar inni hjá øðrum, ikki fáa rætt til leigustuðul við uppskotinum. Sama er galdandi fyri persónar, sum búgva í eini íbúð við einum sonevndum tekøki.

Er talan um eina íbúð í einum sethúsum, t.d. eina kjallaraíbúð, er íbúðin bara at rokna sum *sjálvstøðug*, um hon onkursvegna er skild sundur frá hini búeindini ella hinum búeindunum í húsunum.

Tað skal við øðrum orðum ikki vera púra opið millum ymisku búeindirnar. Tað, at búeindirnar eru felags um t.d. kjallararúm, vaskirúm og/ella bilhús, ávirkar tó ikki rættin til leigustuðul.

Um íbúðin ikki er ein sjálvstøðug íbúð, ber ikki til at fáa leigustuðul, hóast íbúðin hevur egnan køk.

Fyri at fáa leigustuðul er tað harafturat ein treyt, at persónurin ella húskið ikki eigur eina fastogn, ið kann nýtast sum bústaður.

Ein orsøk til hesa treytina er, at leigustuðulin fyrst og fremst er ætlaður teimum, sum hava avmarkaðar møguleikar at sleppa inn á eigaramarknaðin. Eigur eitt húski eina fastogn, ið kann nýtast sum bústaður, kann húskið flyta inn í hesa fastognina ístaðin fyri at búgva til leigu, ella selja fastognina.

Ein onnur orsøk er, at leigustuðulin møguliga kann eggja eldri húskjum, sum eiga sethús, at selja sethúsini fyri ístaðin at flyta inn í eina leiguíbúð.

Persónar ella húski, sum lúka treytirnar í § 1 – og sum ikki eru fevnd av undantøkunum í § 2 – fáa við uppskotinum ein lógartryggjaðan rætt til leigustuðul, sbr. tó ásetingarnar §§ 4-5 og serligu viðmerkingarnar til hesar ásetingar.

Leigustuðulin verður sambært uppskotinum til § 8 útgoldin til 1 persón í húskinum – vanliga tann persónin, ið søkir um leigustuðul vegna húskið – men er til alt húskið, um húskið telur fleiri persónar. Sama húski hevur sostatt bara rætt til 1 x leigustuðul, uttan mun til hvussu nógvar persónar húskið telur.

Til § 2
Uppskotið til *§ 2* ásetur tvey undantøk til meginregluna í § 1 um, hvør ið hevur rætt til leigustuðul.

Sambært uppskotinum til § 2, *stk. 1* hevur ein persónur ikki rætt til leigustuðul, um viðkomandi leigar ein bústað, ið er fevndur av kapitli 6 í almannalógini. Orsøkin til hetta undantakið er, at bústaðir sambært almannalógini ikki eru partur av vanliga bústaðamarknaðinum.

Uppskotið til § 2, *stk. 2* ásetur á sama hátt, at eitt húski, sum leigar ein bústað frá einum ella báðum foreldrum ella verja hjá einum av persónunum í húskinum, ikki hevur rætt til leigustuðul.

Orsøkin er fyrst og fremst hon, at persónar, sum leiga frá foreldrum ella verjum, sjáldan rinda eina leigu, ið svarar til marknaðarvirðið á tí leigaða, og at tað sostatt í flestu førum frammanundan liggur ein óbeinleiðis stuðul í støddini á húsaleiguni. Harafturat verður mett, at vandin fyri sonevndum pro-forma avtalum – sum bara verða gjørdar við tí fyri eyga at fáa stuðul – er serliga stórur í sambandi við leiguavtalur millum foreldur/verjar og børn.

Til § 3
Uppskotið til *§ 3, stk. 1* ásetur støddina á fulla leigustuðlinum.

Skotið verður upp, at fullur leigustuðul skal vera 20 % av húsaleiguni sambært leigusáttmálanum, men í mesta lagi 1.500 kr. um mánaðin.

Tað verður bara veittur leigustuðul fyri tann partin av húsaleiguni, ið er fyri leigu av hølunum. Tað verður ikki veittur leigustuðul fyri útreiðslur til streym, hita og o.tíl. Er húsaleigan sambært leigusáttmálanum íroknað streym og hita og møguligt annað, má leigari sostatt fáa upplýst frá útleigaranum, hvat húsaleigan er, tá eyka útreiðslurnar eru drignar frá.

Verður húsaleigan hækkað, skal leigustuðulin sjálvsagt roknast út frá nýggju húsaleiguni.

Fullur leigustuðul er tann hægst møguligi leigustuðulin, sum kann verða lækkaður ella fella burtur – alt eftir inntøkugrundarlagnum hjá persóninum ella húskinum, sbr. í hesum sambandi §§ 4 og 5 og serligu viðmerkingarnar til hesar greinir.

Leigustuðulin er sostatt inntøkugrundaður.

Til § 4
Leigustuðulin er inntøkugrundaður, og uppskotið til *§ 4* ásetur, nær og hvussu leigustuðulin verður lækkaður í mun til inntøkugrundarlagið hjá húskinum.

Greinin skilir yvirskipað millum húski við einum persóni yvir 18 ár (stk. 1) og húski við tveimum ella fleiri persónum yvir 18 ár (stk. 2).

Inntøkugrundarlagið er at skilja sum samlaðu inntøkurnar hjá persónunum yvir 18 ár í húskinum, sbr. tó uppskotið til § 5, stk. 2.

Inntøkurnar verða gjørdar upp eftir reglunum í § 7 í løgtingslóg nr. 160 frá 24. desember 2015 um familjuískoyti, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 162 frá 20. desember 2023.

Uppskotið til § 4, *stk. 1* ásetur, at leigustuðulin hjá einum húski við einum persóni yvir 18 ár lækkar við 5 % av inntøkugrundarlagnum, sum er omanfyri 350 tús. kr.

Niðanfyri er eitt dømi um, hvussu leigustuðulin verður roknaður sambært § 4, stk. 1 fyri ein stakan persón við inntøkugrundarlagi upp á 400 tús. kr., sum rindar 6 tús. kr. í húsaleigu um mánaðin:

> 20 % av 6.000 kr. er 1.200 kr.
> Inntøkugrundarlagið er omanfyri 350 tús. kr., og tí hevur viðkomandi ikki rætt til fullan leigustuðul. Leigustuðulin lækkar við 5 % av muninum millum inntøkugrundarlag og 350.000 kr. T.v.s., at árliga lækkingin verður roknað soleiðis: 0,5 faldað við (400.000 minus 350.000) = 2.500 kr. um árið, svarandi til eina mánaðarliga lækking uppá 208 kr. (2.500 deilt við 12).
> Leigustuðulin um mánaðin er tí 1.200 minus 208 kr., svarandi til **992 kr.**

Uppskotið til § 4, *stk. 2* ásetur, at leigustuðulin hjá einum húski við tveimum ella fleiri persónum yvir 18 ár lækkar við 5 % av inntøkugrundarlagnum, sum er omanfyri 500 tús. kr.

Niðanfyri er eitt dømi um, hvussu leigustuðulin verður roknaður sambært § 4, stk. 2 fyri eitt húski við tveimum persónum yvir 18 ár við inntøkugrundarlagi upp á 750 tús. kr., sum rindar 9.000 kr. í húsaleigu um mánaðin:

20 % av 9.000 kr. er 1.800 kr. Leigustuðulin kann tó í mesta lagi vera 1.500 kr. um mánaðin.
Inntøkugrundarlagið er omanfyri 500 tús. kr., og tí hevur húskið ikki rætt til fullan leigustuðul.
Leigustuðulin lækkar við 5 % av muninum millum inntøkugrundarlag og 500.000 kr. T.v.s., at árliga lækkingin verður roknað soleiðis: 0,5 faldað við (750.000 minus 500.000) = 12.500 kr. um árið, svarandi til eina mánaðarliga lækking uppá 1042 kr. (12.500 deilt við 12).
Leigustuðulin um mánaðin er tí 1.500 minus 1.042 kr., svarandi til **458 kr.**

Uppskotið til § 4, *stk. 3* ásetur harafturat, at um inntøkugrundarlagið hjá húskinum er so stórt, at leigustuðulin sambært stk. 1 ella 2 verður lægri enn 300 kr. um mánaðin, fellur stuðulin burtur.

Hetta fer við uppskotinum at henda, tá inntøkugrundarlagið hjá einum húski við einum persóni yvir 18 ár er omanfyri 638 tús. kr., og tá inntøkugrundarlagið hjá einum húski við tveimum ella fleiri persónum yvir 18 ár er omanfyri 788 tús. kr.

At enda skal nevnast, at ein persónur yngri enn 23 ár, ið sambært Landsfólkayvirlitinum er skrásettur at búgva saman við einum ella báðum foreldrum, sambært uppskotinum til § 5, stk. 2 ikki telur við í talið á persónum yvir 18 ár í húskinum ella í inntøkugrundarlagið hjá húskinum, les nærri um hetta í serligu viðmerkingunum til ásetingina.

Til § 5
Uppskotið til *§ 5, stk. 1* vísir til § 7 í løgtingslóg um familjuískoyti viðvíkjandi inntøkunum, sum skulu roknast við í inntøkugrundarlagið hjá húskinum.

§ 7, stk. 1 í løgtingslóg nr. 160 frá 24. desember 2015 um familjuískoyti, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 162 frá 20. desember 2023 ásetur, at inntøka er skattskyldug inntøka sambært skattalógini, kapitalvinningsskattalógini og leiguinntøka sambært § 8 a í ásetingarlógini.

§ 7, stk. 2 í løgtingslóg um familjuískoyti ger greitt, at sum skjalprógv fyri inntøkur kunnu t.d. nýtast uppgjørdar sjálvuppgávur og endauppgerðir frá TAKS.

§ 7, stk. 3 tilskilar m.a., at barnaviðbót/barnagjald, serligt barnaískoyti til einsamallar uppihaldarar, viðbót til ávísar pensjonistar, røktarviðbót, hjálparviðbót, avlamisviðbót, avlamisveiting og endurgjald fyri varandi mein og ikki-fíggjarligan skaða ikki verður tikið við sum inntøka.

§ 7, stk. 4 tilskilar m.a., at inntøkutíðarskeiðið fyri A-inntøku, sum familjuískoyti verður grundað á, er inntøkan seinastu 12 mánaðirnar, meðan § 7, stk. 5 tilskilar, at fyri B-inntøku og vinning sambært kapitalvinningsskattalógini er inntøkutíðarskeiðið inntøkan seinast álíknaða inntøkuár.

Reglurnar í § 7 í løgtingslóg um familjuískoyti skulu samanumtikið, í tann mun tað ber til og er viðkomandi, nýtast samsvarandi fyri uppgerð av inntøku í sambandi við útrokning av leigustuðli.

§ 5, *stk. 2* í lógaruppskotinum ásetur, at persónur yngri enn 23 ár, ið sambært Landsfólkayvirlitinum býr saman við einum ella báðum foreldrum sínum ella saman við sínum verja, hvørki telur við í 1) inntøkugrundarlagið hjá húskinum ella 2) talið á persónum yvir 18 ár í húskinum.

Endamálið við fyrra partinum av ásetingini er at tryggja, at "vaksin børn", sum ofta eru undir útbúgving ella í læru og hava avmarkaða inntøku hetta tíðarskeiðið í lívinum, ikki gerast ein fíggjarlig byrða fyri familjuna við hesum uppskotinum.

Seinni parturin av ásetingini – at vaksna barnið yngri enn 23 ár ikki skal roknast við í talið á vaksnum persónum í húsarhaldinum – hevur tann praktiska týdning, at um tað bara er ein annar persónur yvir 18 ár í húskinum, skal leigustuðulin roknast eftir § 4, stk. 1 og ikki eftir § 4, stk. 2. Ítøkiliga merkir hetta, at leigustuðulin hjá húskinum byrjar at lækka, tá inntøkugrundarlagið fer upp um 350 tús. kr., heldur enn tá tað fer upp um 500 tús. kr.

Tankagongdin er, at eins og tað ikki skal vera ein byrða fyri familjuna at hava eitt vaksið barn yngri enn 23 ár búgvandi, skal tað heldur ikki vera ein ógrundaður fyrimunur, tá viðkomandi jú ikki telur við í inntøkugrundarlagið hjá húskinum.

Til § 6
Uppskotið til *§ 6* ásetur, at upphæddin í § 3 (fullur leigustuðul: 1.500 kr. um mánaðin) og inntøkumørkini í § 4 verða javnað sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar.

Endamálið er at tryggja, at leigustuðulin sambært lógaruppskotinum varðveitir sítt lutfalsliga virði yvir tíð.

Til § 7
Sambært uppskotinum til *§ 7, stk. 1* skal umsóknin um leigustuðul latast Almannaverkinum á einum serligum oyðublaði saman við einum avriti av undirskrivaðum leigusáttmála.

Almannaverkið ger eitt oyðublað til endamálið.

Uppskotið til § 7, *stk. 2* ásetur, at Almannaverkið kann krevja nærri upplýsingar og skjalprógv fyri, at treytirnar fyri stuðlinum eru loknar.

Er tað ógreitt, um ein persónur lýkur treytirnar fyri leigustuðli, tí viðkomandi ikki vil lata Almannaverkinum tær upplýsingar, sum eru neyðugar til málsviðgerðina, verður umsóknin ikki gingin á møti.

Við uppskotinum til § 7*, stk. 3* fær Almannaverkið harafturat heimild at útvega sær upplýsingar av týdningi fyri viðgerðina av málum um leigustuðul frá TAKS, Landsfólkayvirlitinum, kommunalum myndugleikum og øðrum viðkomandi myndugleikum.

Til § 8

Uppskotið til *§ 8* ásetur, nær leigustuðulin verður veittur frá, og hvussu stuðulin verður útgoldin.

Leigustuðulin verður veittur frá mánaðinum eftir, at Almannaverkið hevur móttikið umsóknina.

Um Almannaverkið móttekur umsóknina í september, hevur persónurin ella húskið (um treytirnar eru loknar) rætt til leigustuðul at rokna frá oktober, hóast umsóknin ikki er endaliga avgreidd áðrenn hetta.

Hinvegin fer tað ikki at bera til at fáa leigustuðul útgoldnan afturvirkandi, um persónurin ella húskið t.d. hevur lokið treytirnar fyri stuðlinum í eitt tíðarskeið, áðrenn viðkomandi søkti. Ein persónur ella húski, sum leyk treytirnar fyri leigustuðlinum í oktober 2026, men sum ikki søkir um stuðul fyrr enn í januar 2027, kann sostatt bara fáa leigustuðul at rokna frá februar 2027 og ikki frá oktober 2026.

Leigustuðulin verður rindaður mánaðarliga afturúr. Leigustuðulin fyri oktober verður sostatt útgoldin í endanum av oktober.

Leigustuðulin verður útgoldin á kontu hjá *einum* persóni í húskinum. Upplýsast skal í umsóknini, hvønn persón leigustuðulin skal rindast til. Leigustuðul verður ikki veittur til fleiri persónar í sama húski.

Til § 9
Uppskotið til *§ 9, 1, pkt.* áleggur persóninum ella húskinum hvørjar 12 mánaðir at skjalprógva veruligu útreiðslurnar til húsaleigu undanfarna árið.

Tá húskið hevur fingið leigustuðul í 12 mánaðir, skal tað sostatt skjalprógvast fyri Almannaverkinum, at húskið hevur havt veruligar útreiðslur til húsaleigu, og at húsaleiguútreiðslurnar standa mát við støddina á leigustuðlinum, sum húskið hevur móttikið.

Um húskið ikki skjalprógvar útreiðslurnar til húsaleigu innan ta freist, sum Almannaverkið ásetur, kann Almannaverkið – við uppskotinum til § 9, *2. pkt.* – steðga útgjaldinum av leigustuðli, inntil Almannaverkið hevur móttikið nøktandi skjalprógv.

Endamálið við greinini er at geva Almannaverkinum møguleika at hava árligt eftirlit við, at móttakarar av leigustuðli framhaldandi lúka treytirnar fyri stuðlinum. Á henda hátt verður tryggjað, at stuðulsupphæddir, ið skulu afturrindast, tí fólk hava móttikið tær av óréttum, ikki gerast ov stórar.

Til § 10
Uppskotið til *§ 10* ger greitt, at eitt húski, sum móttekur leigustuðul, hevur skyldu til skjótast gjørligt at boða Almannaverkinum frá broytingum í viðurskiftunum, sum kunnu skerja rættin hjá húskinum til leigustuðul.

Um húskið ikki longur býr til leigu, fellur rætturin til leigustuðul sambært § 1 burtur, og Almannaverkið skal hava fráboðan um tað skjótast gjørligt.

Tað sama er galdandi, um húsaleigan verður sett niður, um inntøkuviðurskiftini hjá húskinum broytast, ella um talið á persónum yvir 18 ár í húskinum broytist frá einum persóni til tveir ella fleiri persónar.

Um tað verður flutt í eitt nýtt leigumál við nýggjum leigusáttmála, heldur rætturin til leigustuðul uppat, og tað skal søkjast um leigustuðul av nýggjum.

Til § 11
Uppskotið til *§ 11* snýr seg um afturrindan av leigustuðli, ið er móttikin av órøttum.

Sambært § 11, *stk. 1, 1. pkt.* skal ein persónur rinda stuðulin aftur, um viðkomandi *átti at verið vitandi* um, at hann ikki hevði rætt til stuðulin.

Sambært § 11, stk. 1, *2. pkt.* skal persónurin eisini rinda stuðulin aftur, um orsøkin til, at viðkomandi hevur fingið stuðul av órøttum, eru *skeivar upplýsingar* frá viðkomandi, sum viðkomandi hevur havt skyldu at lata Almannaverkinum í sambandi við leigustuðulin. Talan kann eitt nú vera um upplýsingar í sambandi við umsóknina sambært § 7 og upplýsingar í sambandi við skjalprógvan av útreiðslum sambært § 9.

Uppskotið til § 11, *stk. 2*, 1. pkt. heimilar Almannaverkinum at gera avtalu við skuldaran um, hvussu afturrindanin av stuðlinum skal fara fram, heldur enn at krevja alla upphæddina endurgoldna í einum.

Í sambandi við avtalur um afturgjaldsskipan fær Almannaverkið harafturat heimild útvega sær upplýsingar um ognarviðurskiftini hjá skuldara frá TAKS og øðrum viðkomandi myndugleikum – hetta fyri at kunna gera eina so rímiliga avtalu fyri báðar partar sum møguligt.

Uppskotið til § 11, *stk. 3* heimilar, at afturgjaldskrøv kunnu krevjast inn við panting ella afturhaldast í A-inntøkuni.

Tó at trupult er at seta nakað neyvt tal á, verður roknað við, at rættiliga nógv fólk fara at fáa rætt til leigustuðul við uppskotinum, tí tað eru sannlíkt millum 2000 og 3000 leigumál tilsamans á privata og almenna leigubústaðamarknaðinum í Føroyum. Sannlíkt verða tí eisini nøkur krøv um afturrindan av stuðli, ið er móttikin av órøttum, og neyðugt er hjá landinum at hava sterk amboð og góðar møguleikar at heinta hesi krøvini inn.

Viðmerkjast skal tó, at panting og afturhald í A-inntøkuni bara skal nýtast, tá aðrir, minni inntrívandi møguleikar eru troyttir. Eitt nú *skal* Almannaverkið hava roynt at gjørt eina avtalu við skuldaran um afturgjaldsskipan av kravinum.

Í § 11, *stk. 4* verður ásett, at TAKS fremur panting sambært stk. 3 eftir reglunum um innkrevjing av skattum og avgjøldum og afturheldur í A-inntøku sambært reglunum um lønarafturhald í skattalógini.

Til § 12
Við uppskotinum til *§ 12* fara avgerðir hjá Almannaverkinum viðvíkjandi leigustuðli at kunna kærast til Føroya Kærustovn. Ein avgerð skal kærast innan 4 vikur eftir, at kærari hevur fingið fráboðan um avgerðina.

Til § 13
§ 13 er uppskot til revsiáseting.

Uppskotið ásetur, at um ein persónur annaðhvørt tilætlað ella av grovum ósketni letur Almannaverkinum skeivar upplýsingar sambært § 7, stk. 1 og 2 ella § 9, 1. pkt., kann viðkomandi revsast við sekt. Talan er um upplýsingar, sum ein persónur hevur skyldu at lata Almannaverkinum í sambandi við umsóknina um leigustuðul, og sum hava týdning fyri viðgerðina av umsóknini.

Ein persónur kann við uppskotinum til § 13 á sama hátt revsast við sekt, um viðkomandi ikki heldur sína skyldu at boða frá broytingum sambært § 10, sum kunnu ávirka rættin hjá húskinum til leigustuðul.

Álvarslig og serliga álvarslig brot á løgtingslógina kunnu harafturat – eftir umstøðunum – koma undir reglurnar um sosialt svik í §§ 289 og 289 a í revsilógini.

Til § 14
Uppskotið til *§ 14* er gildiskomuáseting. Skotið verður upp, at løgtingslógin skal koma í gildi 1. september 2026.

Sambært uppskotinum til § 8 verður stuðul veittur frá mánaðinum eftir, at Almannaverkið hevur móttikið umsóknina um leigustuðul, og stuðulin verður goldin mánaðarliga afturúr. Verður søkt um leigustuðul í september 2026, verður leigustuðul sostatt veittur at rokna frá oktober 2026.

Almannaverkið fer væntandi at fáa sera nógvar umsóknir um leigustuðul fyrstu tíðina, og tí kann roknast við eini meiri drúgvari málsviðgerðartíð enn vanligt. Um neyðugt verður leigustuðulin útgoldin afturvirkandi.

Til § 15
§ 15 í lógaruppskotinum er uppskot til fylgilógarbroyting í § 21, stk. 4 í almannalógini, ið hevur við sær, at leigustuðulin ikki fer at verða drigin frá fyribils uppihaldsveitingini sambært almannalógini.

Til § 16
§ 16 í lógaruppskotinum er uppskot til fylgilógarbroyting í § 12, stk. 6 í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, ið hevur við sær, at leigustuðulin ikki fer at verða mótroknaður í stuðulsveitingini sambært § 12 í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.

Til § 17
§ 17 í lógaruppskotinum er uppskot til fylgilógarbroyting í § 7, stk. 3, 2. pkt. í løgtingslóg um familjuískoyti, ið hevur við sær, at leigustuðulin ikki fer at ávirka rættin til familjuískoyti.

Til § 18
§ 18 í lógaruppskotinum er uppskot til fylgilógarbroyting í § 29, nr. 13 skattalógini, ið hevur við sær, at leigustuðulin verður undantikin skattskylduni og sostatt fer at vera ein skattafrí veiting.

Almanna- og bústaðamálaráðið, 5. mai 2026.

Margit Stóra
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Føroya Kærustovni
Fylgiskjal 3: Ummæli frá Landsfelag Pensjónista
Fylgiskjal 4: Ummæli frá Landsbanka Føroya
Fylgiskjal 5: Ummæli frá MARK
Fylgiskjal 6: Ummæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
Fylgiskjal 7: Ummæli frá Bústøðum
Fylgiskjal 8: Ummæli frá Almannaverkinum
Fylgiskjal 9: Ummæli frá Heilsuhjálparafelag Føroya
Fylgiskjal 10: Ummæli frá Áhugafelagnum Lutaíbúðir
Fylgiskjal 11: Ummæli frá Verkafólki
Fylgiskjal 12: Ummæli frá Boga Holm Mikkelsen (privatpersónur)